# Eftirlýst yrking

Jákup Andreas Arge á Argjum eftirlýsir hesi yrking, sum hann minnist frá einum ungmannafelagsfundi í Húsavík miðskeiðis í fýratiárunum. Hann hevur spurt fleiri fólk, um tey minnast yrkingina, men eingin sigur seg minnast.

Hann vil so fegin vita meira um yrkingina, hvør hevur yrkt o. s. fr. Tey, ið halda seg vita nakað um hetta eru vælkomin at seta seg í samband við Jákup Andreas á telefon 316551 ella 216551.

*Várt merki er frítt*
*og so yndisligt skrýtt*
*tað er hvítt, blátt og reytt*
*og so livandi sett*
*at tað rørist hvør sál*
*og alt føroyska mál*
*rópið varðveitið flaggið hvítt, blátt og reytt*

# Froyur á Summarfestival

SUMMARFESTIVALUR

Nýggi ferðamannabáturin hjá Sjóferðum, Froyur, fer at sigla beinleiðis millum Havnina og Klaksvík tá Summarfestivalurin 2005 er næsta vikuskifti.

Fyrsti túrurin er av Havnini fríggjadagin kl 17.00 og av Klaksvík aftur kl 01.00. Leygardagin verður farið av Havnini kl 13.00 og av Klaksvík kl 01.30.

Túrarnir eru treytaðir av, at nóg nógv tekna seg frammanundan, og á Sjóferðum siga tey, at boðast skal frá luttøku í seinasta lagi hósdagin. Tilmeldingin er hjá Vestmanna Kunningarstovu, sum hevur telefon 471500 ella hjá Sjóferðum sum hava telefon 471600.







Leiðari til eldraøkið

# Ert tú rætti leiðarin

Tú hevur hugsanir um, hvussu eldraøkið kann mennast frameftir. Tær dámar avbjóðingar, og tú hevur evnini at leiða og motivera eitt ymisligt lið av leiðarum við ymisligum arbeiðsumstøðum.

Ljóðar hetta sum tú? So er eitt spennandi starv sum leiðari fyri eldraøkið leyst at søkja. Økið er í støðugum vøkstri, og tí krevst ein framsíggin persónur við góðum leiðaraevnum, ið setir framburð og trivnað í hásætið.

**Bygnaður og starv**
Deildin fyri eldraøkið er skipað undir Heimarøktini og Serforsorgini. Deildin fevnir í høvuðsheitum um heimarøktina og ellis- og røktarheimini. Virksemið er kring alt landið. Deildin umsitur fyri uml. 250 milliónir krónur árliga. Tað eru í løtuni uml. 845 starvsfólk innan økið, harav 455 starvast í Heimarøktini. Leiðarin arbeiðir í tøttum samstarvi við økis- og stovnsleiðarar um alt landið.

Leiðarin hevur ábyrgd mótvegis stjóranum í Heimarøktini og Serforsorgini.

Umframt deildina fyri eldraøkið eru fýra aðrar høvuðsdeildir undir Heimarøktini og Serforsorgini, og tí gongur leiðarin inn í eitt kollektiv av leiðarum.

Arbeiðsplássið er dynamiskt og umsitur eina sera týðandi samfelagsskipan. Økið hevur stóran almennan áhuga, tí tað fevnir um tænastu til nógv fólk, og tað er ein avbjóðing at liva upp til krøvini við teimum fíggjarligu kørmum, sum politiska skipanina setir.

Talan er um eitt tað størsta arbeiðsplássið í Føroyum, og tað økist, so hvørt fleiri uppgávur verða fluttar út í primeru heilsutænastuna.

**Uppgávur og krøv**
Leiðarin hevur fíggjarligu, fyrisitingarligu og fakligu ábyrgdina á øllum økinum. Uppgávurnar eru sera fjølbroyttar, og eingin dagur er eins.

Starvið krevur, at tú hevur viðkomandi útbúgving og hollar leiðslu- og starvsroyndir. Persónliga krevst, at tú hevur breiðan rygg og ert týðiligur. Leiðarin má eisini hava hegni og evni at koma fram til framtíðarloysnir og fremja tær í verki. Tað krevur millum annað, at tú dugir at skapa sambond og varðveita tey. Tú skal vera savnandi og skapandi, tí einki verður framt uttan í samstarvi við onnur.

Starvið gevur tær ávirkan, tú kemur í samband við nógv fólk og hevur góðar møguleikar fyri eftirútbúgving.

Um fleiri upplýsingar ynskjast ber til at ringja til Meginskrivstovuna á telefon 304020 og tosa við Mary J. í Garði, stjóra.

**Umsókn og freist**
Umsóknarfreistin er mánadagin 5. september 2005, og starvið verður sett skjótast tilber. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðkomandi skjølum skal sendast til:

Heimarøktin og Serforsorgin
Att: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
Postboks 3037
FO-110 Tórshavn

Heimarøktin og Serforsorgin
Eirargarður 2, 2. hædd, Tel 304020, Fax 304010, heimser@heimarokt.fo

www.sansir.fo